Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Nýggjur Sparikassabygningur – ein perla hjá fuglfirðingum

**Fyrr í hesi vikuni varð nýggjur og sera snotuligur deildarbygningur hjá Føroya Sparikassa tikin í nýtslu í Fuglafirði. Í tí sambandi var ein væl vitjað móttøka, har fuglfirðingar høvdu høvi at skoða snotuliga bygningin og heilsa uppá sparikassafólk og bygdarfólk**

## MÓTTØKA

Ein stórur partur av fuglfirðingum nýtti fyri viku síðani møguleikan at støkka inn á gólvið til móttøku hjá Føroya Sparikassa, sum júst hevur latið upp eina nýggja, sera vakra privatkundadeild upp í Fuglafirði.

Sera nógv fólk var á gátt, fleiri áhugaverdar røður vórðu hildnar, og uttan iva fingu fólk eisini nógv góð prát sínamillum.

## Opin og nýmótans

Nýggja Sparikassadeildin er bygd í nýmótans stíli, og bygningurin er klæddur við skifer.

Miðbygningurin er gjørdur opin og gjøgnumskygdur, so deildin eisini framstendur opin, løtt og ljós.

Bygningurin er í trimum og liggur sum partur av fríøkinum við kirkjuna. Bygningurin kann sigast at vera bindiliðið millum fríøkið og miðbýin, tí tað sæst gjøgnum miðbygningin, ið liggur í einari linju frá kirkjuni gjøgnum fríøkið og oman á høvuðsgøtuna.

## Arkitektar 99 teknað

Tað eru Arkitektar 99 við Maritu Weihe, sálu, og Jóhann Laksáfoss, ið hava teknað bygningin, sum er 250 fermetrar til støddar.

Jan Mohr sp/f hevur havt høvuðsarbeiðstøkuna, sum umfatar lendisarbeiði, jørð- og betongarbeiði, timbur- og snikkaraarbeiði, málaraarbeiði, múraraarbeiði, hvsarbeiði.

Jákup Jacobsen, fyrrv. byggifrøðingur hjá Sparikassanum, hevur havt projekt- og byggileiðsluna.




*Formaðurin í ÍF, Mortan Thomsen, tekur fegin ímóti einum gávukekki frá Sparikassanum á 25.000 krónur. Tað er Elin Sleire, fulltrúi á deildini í Fuglafirði, sum handar honum kekkin*




*Prát uppi yvir kekkinum. Signar á Brúnni og Mortan Thomsen skifta orð um pengagávuna til ÍF*



*Gávan frá Fuglafjarðar Kommunu í sambandi við upplatingina av nýggju sparikassadeildini í býinum var ein málningur eftir Øssur Mohr. Vinstrumegin er tað Bjarni Olsen, stjóri í Sparikassanum, sum heldur vakra málninginum*



*Stjórin á Havsbrún í Fuglafirði, Bergur Poulsen, heilsar uppá Kristine Ellingsgaard, varaleiðara fyri deildir Sparikassans í Eysturoy*



*Sera nógv fólk samankomið í teimum vøkru og ljósu hølunum hjá Føroya Sparikassa í Fuglafirði*



*Gáva frá kommununi í Fuglafirði. Borgarstjórin, Sigurð Simonsen, handar Elini Sleire, fulltrúa í Fuglafirði, gávuna*



*Bygningurin avmyndaður sunnanífrá. Eitt bland av glasi og gróti, og fólk hugna sær inni og úti*



*Fólk lýða á, meðan røða verður hildin*